## Kunningarfundur um produktivitet

**Dagur: týsdagin 21. mars**
**Tíð: Kl. 14.00 til uml. kl. 18.00**
**Staður: Hotel Føroyar**

Heitið produktivitetur er lutfalsliga nýtt í føroyskum virkisbúskapi. Tá talan er um produktivitet og mátingar av hesum, eru tað onnur lyklatøl, enn tey mest vanligu roknskaparligu, ein skal hava fatur á. Á hesum fundi vil Símun Hammer frá Virkisráðgeving Sp/f vísa hvussu ein miðvíst kann arbeiða við at máta produktivitet í einari fyritøku.

Eftir fundin skal ein kunna verða førur fyri at gjøgnumføra nakrar einfaldar produktivitetsmátingar, m.a. við hjálp av einum produktivitetsdiskli, ið luttakararnir fáa útflýggjaðan.

Skráin verður í høvuðsheitum soleiðis:

14.00 Ólavur Gregersen frá TK-stovuni bjóðar vælkomin
14.10 Produktivitetshugtakið og teoretiskar greiningar í hesum sambandi.
14.30 Produktivitetur í praksis: Samanbering av nøkrum fyritøkum, ið uppnáa ymiskan produktivitet orsakað av ymiskum tillagingum.
15.00 Lyklatøl: Hvørji lyklatøl eru týdningarmikil í samband við produktivitets-mátingar, og hvussu finnur ein fram til hesi lyklatølini.
15.30 **CASE:** Útgangsstøðið eru tær somu samanberiligu fyritøkurnar.
16.15 **Kaffisteðgur**
16.25 Produktivitetur og framleiðslustýring. Gjøgnumgongd av einari góðari framleiðslustýring, og kravfesting til hesa við atliti at einum høgum produkttiviteti.
16.55 Íverkseting av produktivitets betringum: Hvussu kann ein gerðarætlan síggja út, og hvat krevst fyri at fáa hetta gjøgnumført.
17.10 Luttakararnir fáa útflýggjaðan ein produktivitetsdiskil. Hvussu kann hesin nýtast í gerðandisdegnum í samband við útrokning av produktiviteti? Her verða konkret dømir gjøgnumgingin, har luttakararnir eisini fáa tey tølini, sum vit nýta í dømunum útflýggjaði.
17.40 Produktivitetur gjøgnum samstarv. Øktur produktivitetur kann náast gjøgnum "erfaringsútveksling" millum fyritøkur. Hetta hugtakið verður ofta nevnt "Benchmarking" og krevur eitt tætt samstarv á ávísum leiðsluøkjum millum fyritøkur. Stutt um hvussu hetta kann virka í praksis.
18.00 Samandráttur og høvi til at seta spurningar.

**Tilmelding: TK-Stovan,** fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 317366 ella teldupost tk@tk.fo

**Kostnaður:** 350 kr. u/mvg

**Tilmelding í seinasta lagi mánadagin tann 20/3-2000** áðrenn kl. 12.00.

## Umbýti av koyrikortum

Mint verður á, at koyrikort, sum ikki eru í ES-sniði, fara úr gildi við árslok ár 2000 og skulu vera umbýtt áðrenn ta tíð.

Mint verður eisini á, at tey sum ætla sær uttanlands í summar, eiga at umbýta gamla koyrkort sítt í góðari tíð við eitt nýtt koyrikort í ES-sniði. Roknast kann við eini avgreiðslutíð uppá 1 til 2 mánaðir.

Umbýtið fer fram á Bileftirlitinum og uttan fyri Havnina á politistøðunum. Umbýtið er skipað soleiðis, at viðkomandi býtur sítt koyrikort um í sama mánaði, sum føðingardagurin er.

Umbýtið kostar 250 kr., sum skal vera goldið frammanundan, antin í banka ella á posthúsi við umbýti á politistøðunum.

Hav gamla koyrikortið við, vælfrofna portrettmynd (hattleys) og møguligt navnabræv, um navnabroyting er farin fram.

Tórshavn, hin 9. mars 2000
**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57 • 110 Tórshavn
Tlf. 350400/fax 350401
Teldupostur: bef@bef.fo


**Bahá'í samfelagið í Tórshavn**
**Miðstøðin í Gundadali**

Opið hvørt fríggjakvøld. Samkoma kl. 20

»Áset tú mær, O harri mín, og teimum, sum trúgva á teg, tað, ið hildið er at vera best fyri okkum eftir tíni meting…«
Baha'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo



**www.wenzel.fo**



## Betri svøvn

**BIOflex magnetviðgerð tí:**

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNET TERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916





## Hús í Runavík/Glyvrum til prestagarð ynskjast til keyps

Í sambandi við at nýtt prestagjald er skipað á Glyvrum, søkir Føroya Stiftsstjórn eftir hóskandi húsi til prestagarð.

Áhugað biðjast venda sær til Føroya Stiftsstjórn, att: Johan Laksáfoss, arkitekt, tlf. 210935, skjótast gjørligt.

**Føroya Stiftsstjórn**
J. Paturssonargøta 20
Postrúm 8 • 110 Tórshavn



**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**

SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

Tlf. 32 22 22



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**



## Heimahjálparafelag Føroya

lýsir til ársaðalfund í Havnar Klubba leygardagin tann 8. apríl kl. 13.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**



sosialurin
-har tað hendir


# K@T@-hornið


**Nr. 1 • hósdagur • 16. mars 2000 • 74. árgangur**

**Tíðindablaðið Sosialurin,** Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
**Blaðstjórn:** Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin
KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag. Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.


## Innihald


Síða 1. **Grein um Alnótina** – Bygnaður og nýtsla.
**Fragreiðing um hvat internetið umfatar**, so sum www, teldupostur, kjaksíður og fílaflutningur.
**Tíðindastubbar** uttan úr heimi.

Síða 2. **Petur Zachariassen skrivar grein**, sum hann kallar "Frá roknisnurru til farteldu" – Nakrar KT-søguligar hugleiðingar.
**Spurnakassi**, har lesarar hava høvi til at seta serfrøðingum spurningar. –Leivur Dalsgarð frá ITEC á Argjum svarar 2 spurningar um modem og tráðleyst samband.

Síða 3. **KT virki** hesa ferð er um ALNÓT-TELECOM, sum um stutta tíð ferð at taka kappingina upp við Føroya Tele.

Síða 4. **Heimasíðu ummæli** hesa ferð er um nýggju heimasíðuna hjá Olivant, sum samanlagt fær 4 av 6 stjørnum.
**Topp 10 listin** yvir mest vitjaðu føroysku heimasíðurnar.
**Káta Hornið** við eini skemtisøgu.



Finn Jensen


Steinbjørn í Dali

## Smátíðindi

### Ávaring um teldupost virus



Eitt teldupostvirus, sum fyrstu ferð sá dagsins ljós seinasta summar, gongur nú aftur. Virusi spjaðist við at tað leggur seg sum eina viðlagda fílu (attachment) til allar adressur í adressulistanum í Outlook Express. Virusi hevur millum annað rakt brúkarar í Danmark og tá er ikki so langt til Føroyar.

Virusið roynir at senda seg sjálvan hvønn hálvan tíma, og kann tí skapa eitt satt ódnarveður um vit hugsa okkum eitt miðalstórt virki við atgongd til internetið, skrivar CNN.com.

Tann virussmittaði teldupósturin sær út sum ein vanligur teldupostur, og avsendarin er ein sum móttakarin vanliga fær teldupost frá.

Virusið er ein variantur av "w32/prettypark.worm", sum fyrstuferð sá dagsins ljós í juni mánaða í fjør.

Tey sum brúka Outlook Express skulu vera varin og serliga hyggja eftir um innihaldið í evnilinjuni er "C:/coolprogs/prettypark.exe".

Viðlagda fílan kallast "Prette park.exe" ella í summum førum "Pretty~1.exe".

### FBI handtikið teldusník

Ein 17 ára gamal drongur er handtikin í USA, illtonktur fyri at vera teldusníkurin Coolio, sum skipaði fyri internetálopunum á fleiri stórar amerikanskar heimasíður sum t.d. Yahoo, CNN og Amazon.

Amerikanska løgregluliðið FBI hevur lagt hald á telduna hjá dronginum og har funnið prógv fyri internetálopum á fleiri internet heimasíður. Tað seinasta álopið bleiv gjørt á heimasíðuna hjá stóra amerikanska trygdartænastufelagnum RSA-Security, har Coolio kláraði at skriva sína heilsan inn á høvuðssíðuna.

FBI meinar tó at hesin 17 ára gamli drongurin ikki er einsamallur um at goyma seg aftanfyri navnið Coolio.

Ein annar bert 15 ára gamal drongur úr Canada, sum hevur brúkt navnið Mafiaboy, er eisini mistonktur fyri at hava verið við í hesum internetálopum.

Ikki kann sigast annað at hetta eru ungir teldusníkar og at teir helst gera tað fyri spenningin, men nú verða teir revsaðir sum vanligir brotsmenn. Tað er tó heilt vanligt at tílíkir teldusníkar verða settir í góð størv hjá teldufyritøkum. Teir hava jú víst hvat teir duga til.

**Teldusníkur**

er føroyska orði fyri "hacker".
Ein teldusníkur er ein sum ólóliga fer inn á telduneti hjá øðrum. Endamálið er sum oftast bert at vísa hvat teldusníkurin er førur fyri.

### Citroën hópframleiðir Windows bil

Heimsins fyrsti hópframleiddi samskiftisbilur kemur nú á gøtuna frá Citroën, Ericsson og Microsoft.

Leingi hevur trafikkurin uttanfyri stýrhúsið á bilunum verið vandamikið. Nú er vandin eisini inni í stýrhúsinum á vinylinum á nýggja Citroëns Xsara Windows CE. Við útgerð sum adressubók, handfree telefon, navigeringstól, SMS, teldupost og aðra telduútgerð upp til bæði síðuspeglini. Vælkomnir allir bilførarar til "spamming", "hacking" og "biip" - "ulovlig handling".

Tann elektroniski motorvegurin er fyri fyrstu ferð hópframleiddur siga teir hjá franska bilframleiðaranum Citroen, sum í samstarvi við Ericsson og Microsoft hava flutt eina T28 mobiltelefon umframt eina teldu við Windows CE inn í stýrhúsið á bilinum. Teldan hevur beinleiðis samband við ein GPS-móttakara, sum stýrir navigatiónini.

Fyribils kann tann ravtøkniligi (elektroniski) bilførarin bert brúka internetið til teldupost, men Citroen upplýsir, at fyritøkan arbeiðir við at menna møguleikarnar við at bilurin fær sína egnu heimasíðu og at allir telduhentleikar kunnu stýrast við røddini.

*Skrivað: Steinbjørn í Dali*
*sid@sosialurin.fo*

## Alnótin -*Bygnaður og nýtsla*



**Alnótin kann lættliga samanlíknast við telefonkervið. Báðar skipanir nýta aloftast sama kervið. Á sama hátt, sum okkum nýtist eitt telefonnummar fyri at tosa í telefon, nýtist okkum eina internetadressu fyri at koma í samband við onnur um alnótina.**

Alnótin er í dag samansett av fleiri tænastum, millum aðrar eru:

- Heimsnetið, eisini nevnt World Wide Webb
- Elektroniskur postur
- Kjaksíður
- Fílaflutningur og fílaveitingar

**Heimsnetið**
Fyri at nýta heimsnetið, er neyðugt við einum leitibúnaði (sí umtalu í blaðnum næsta hósdag), ið kan lesa og skilja tað sum stendur á netinum. Við hjálp av einum leitibúnaði ber til at koma í samband við aðrar teldur á netinum. Fyri at koma í samband við ein annan brúkara, skal ein kenna adressuna hjá viðkomandi, ið t.d. kann vera:
**www.olivant.fo**

Sum tað sæst, er adressan býtt upp í tríggjar partar, við punktum ímillum. Fysti parturin (www), sigur at talan er um heimsnetið. Næsti parturin sigur nakað um navnið hjá viðkomandi móttakara. Triðji parturin er øki hjá brúkaranum, hetta nevnist á fremmandamálið *domeni*.

Tað finnast nógv slík øki, ella heimstaðir, ið aloftast eru tengdir at londum og landakotum, millum onnur eru hesi:

| | |
|---|---|
| Australia | .au |
| Brasilia | .br |
| Danmark | .dk |
| Canada | .ca |
| Finnland | .fi |
| Frakland | .fr |
| Føroyar | .fo |
| India | .in |
| Japan | .jp |
| Kina | .cn |
| Póland | .pl |
| Niðurlond | .nl |
| Noreg | .no |
| Týskland | .de |
| Stórabretland | .uk |
| Svøríki | .se |
| osfr. | |

Adressan hjá móttakaranum verður aloftast skrivað inn ovast á breddanum í forritinum vit nýta.

Um vit skulu síggja ymsar upplýsningar, ber til at skriva inn hesar adressur, eitt nú kunnu vit skriva:
**www.logting.fo**

Um vit ynskja upplýsningar um tingarbeiðið í Føroyum. Á sama hátt kunnu vit fara inn á **www.folketinget.dk** fyri at frætta frá danska tinginum, ella **www.stortinget.no** um vit vilja frætta frá nærmastu grannum okkara í eystri. (Legg til merkis, at serføroyskir ella serdanskir stavir ikki kunnu nýtast í adressuni).

Av tí at alnótin er ein amerikansk uppfinning, hava amerikumenn eina aðra økisskipan. Í staðin fyri, eins og í Evropu, at býta økini upp geografiskt, býta teir økini upp eftir evnum. Tey mest nýttu eru:

| | |
|---|---|
| Fyritøkur | .com |
| Stovnar undir stjórnini | .gov |
| Útbúgvingarstovnar | .edu |
| Áhugafeløg | .org |

Tað eru tó ikki bert stovnar í USA ið nýta hesi økisnøvn, eitt nú finna vit donsku fyritøkuna, Lego og heimasíðuni: **www.lego.com**

Í USA finna vit millum annað lóggávutingið á adressuni: **www.house.gov** Somuleiðis finna vit Hvítu Húsini í Washington á adressuni:
**www.whitehouse.gov**

Tað er tó ikki altið at einum nýtist at skriva adressurnar sjálvur. Nógvar heimasíður hava slóðir (links) til aðrar heimasíður, og hetta ger sjálvsagt arbeiðið nógv lættari. Um vit skulu finna føroyskar heimasíður, ber til at fara inn á
**www.olivant.fo**

**Net leitarar**
Á alnótini finnast ein rúgva av leitimaskinum, har tað ber til at skriva eitthvørt inn í ein rút, og síðan kemur leitarin framm við teimum uppskotum, ið kunnu tengjast tað vit hava skriva. Umframt leitimaskinurnar finnast eisini sonevnd evnisyvirlit á somu heimasíðum. Millum kendastu Netleitarnar eru:
**www.jubii.dk**
**www.yahoo.dk**
**www.yahoo.com**
**www.kvasir.dk**
**www.altavista.telia.com**
og føroyska **www.leitel.fo**

Tær allarflestu av hesum síðum hava eisini evnisyvirlit, soleiðis at til ber at depla seg til ávís evni hendanvegin. Til dømis kunnu vit velja *ítrótt*, síðan *fótbólt* og síðan til dømis *Liverpool* ella *Manchester United*, og so framvegis.

Annars verður víst til greinina um Olivant, ið ein kann nýta sum útgangstøðu áðrenn farið verður til brots í tí stóra heimi. Á Olivant finst nevnliga eitt evnisyvirlit, ið er viðgjørt í aðrari grein í hesum blaðið.

*So er bert eftir at siga, góðan róður á alnótini.*

***Skrivað: Finn Jensen***
***finn@sosialurin.fo***